# Jólamaðurin „Kjøtkrókur" ynskir øllum eini gleðilig jól



...og takkar niðanfyristandandi fyri dyggan stuðul

FØROYA BANKI · TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR · BYGMA BALSLEV · MBM · SKEMMAN · Atlanticpane · inn Við Landavegin · DADDAN · OPTIKBÚÐIN · Eik · sms · Eikin · fk í Hoyvík · city · Pizza 67 · Føroya Bjór · vodafone · FØROYA TELE · NANTONG

---

# SEV

www.sev.fo

## Kunngerð um afturlatingartíðir og vaktarhald hjá SEV um jólini og ársskiftið

Allar skrivstovurnar hjá SEV eru stongdar yrkadagarnar um jólini og ársskiftið.

Stongt er frá 23. desember kl. 1600. Opið verður aftur mánadagin 4. januar 2010 kl. 800.

Øll linjuabeiðir, skrivstovuarbeiðir og annað, sum tolir at bíða, verður steðgað hesar dagar.

Vit hava vakt alt samdøgrið. Til ber at fáa fatur á vaktini umvegis tlf. nr. 346800

Vaktin tekur sær bert av bráð-neyðugum viðurskiftum so sum streymsliti ella breki á elveitingini.

*Tórshavn, tann 21. desember 2009.*
**Elfelagið SEV**

***Øllum viðskifta- og starvsfólki okkara ynskist eini gleðilig jól og eitt gott og eydnuberandi nýggjár!***

ELFELAGIÐ SEV · POSTSMOGA 319 · 110 TÓRSHAVN · WWW.SEV.FO · SEV@SEV.FO

---

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

# Ískoytisútbúgving til Bachelor í Sjúkrarøktarfrøði

Við heimild í Løgtingslóg nr.2 frá 22 januar 2003 og kunngerð nr 90 frá 15. juni 2009 um ískoytisútbúgving fyri sjúkrarøktarfrøðingar, útbúnir eftir eldri lógum, tekur Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya lesandi inn at byrja at lesa til Bachelor í sjúkrarøktarfrøði í marts 2010.

**Endamál:**
Endamálið við ískoytisútbúgvingini til bachelor í sjúkrarøktarfrøði er:

- Førleiki í sjúkrarøktaryrkinum sum vísindagrein
- Ástøðilig uppstiging av sjúkrarøktarfakligu grundútbúgvingini og royndar- og vitanargrundarlagi sjúkrarøktarfrøðingsins frá starvsroyndum
- Lestrarfyrireikandi og upptøkugevandi førleiki til master- og kandidatútbúgvingar
- Førleiki at skilja granskingarverkætlanir og sjálv/-ur at luttaka í menningarverkætlanum

**Skipan og innihald:**
Útbúgvingin er sett at vera ½ ársverk ella 30 ECTS stig.

| Várið 2010 | Heystið 2010 | Várið 2011 |
|---|---|---|
| mars – apríl – mai | sept. – okt. – nov. | mars – apríl – mai |

**Ískoytisútbúgvingin er býtt sundur í 3 eindir**

- Ein grundleggjandi kravd eind (várið 2010)
- Ein valfrí eind (heystið 2010)
- Bachelorverkætlanareind (várið 2011)

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya ger av, eftir ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri, at útbúgvingarpartar, sum lesandi hevur staðið eftir reglum fyri eina aðra framhaldsútbúgving, heilt ella lutvíst kunnu koma í staðin fyri samsvarandi útbúgvingarpartar.

**Fígging:**
Kostnaður fyri útbúgvingina er 7000 kr. fyri hvørja eind umframt útreiðslur til bókmentir og annað tilfar.

Nærri lýsing av útbúgvingini, undirvísingardagar og umsóknarblað vera á heimasíðuni í januar 2010 www.srfs.fo undir ískoytisútbúgving.

Eru spurningar, ber til at venda sær til Ásu Róin, útbúgvingarleiðara á Sjúkrarøktarfrøðisskúla Føroya, tlf.352254.

**Umsóknarfreist**
Umsóknarfreistin er 20. januar 2010 kl 16:00. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og øðrum upplýsingum skal sendast til:

Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya
Jónas Broncksgøta 25
FO-100 Tórshavn

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo